SOSIALURIN

Nr. 51 — 22. JULI 1964 — 37. ÁRG.

Í DAG

EIN ÁHUGAVERD FRÁGREIÐING

85 pst. av øllum mannfólkum eru undir tufluni

Menn eru ikki longur teir livsglaðu, elskandi og drekkandi slagsbrøður, teir einaferð vóru; men nakrir moddir vesælingar. Kvinnurnar hava ikki verið seinar at gjørt sær til góðar av hesi vesælastøðu mannsins. 85 pst. av øllum monnum í USA eru undir tufluni, meðan annarhvør er tað í Europu. 62 pst. av kvinnunum í øllum aldursstigum í siviliseraða heiminum geva skapninganna harra hetta skoðsmál: Menn nú á døgum eru ikki rættir menn!

Tað er Unesco, sum er komin til hetta syrgiliga úrslit, tá hesin alheimsstovnur kannaði, hví menn eru so móðir.

Kanningarnar eru gjørdar av medisinarum og sálarfreðingum. Teir komu til tað úrslit, at 70—80 pst. av monnunum í Vestureuropu og Ameriku líða av kroniskari møði bæði likamliga og sálarliga. Høvuðsorsøkin til møðina kemur ikki av nervatrýsti undir arbeiði, men av biologiskum broytingum.

MANNAMÁTTURIN ER FARIN MED ALLA

Kanningarnar siga, at neyðars menn eru vorðnir móðir, tí teir í ártúsindir hava borið høvuðsbyrðuna í stríðnum fyri okkara dagligu tilveru. Hetta hevur minkað um livsorku mannsins, sum ikki longur hevur fornfedranna mátt og megi.

Menninir líða av livsmøði og livsangist. Helmingurin av øllum kroniskum sjúkum hjá monnum tykjast vera av sálarligum uppruna, meðan bara 30 pst. av kroniskum sjúkum hjá kvinnum eru av sálarligum uppruna.

Hetta kemur týðuligast til sjónd-ar í sambandi við sjálvmorðshagtølini, sum telja $^{2}/_{3}$ menn og bara $^{1}/_{3}$ kvinnur.

KVINNAN VERÐUR EINS STERK OG MAÐURIN

Svenski sosiologurin, H. Hillberg, professari, meinar, at hann eftir 50 ára kanningum hevur fingið prógv fyri, at dirvið, ágrýtnið og áhugin stoðugt viknar hjá manninum, men alt hetta tekur til hjá kvinnunum.

Ein annar granskari, dr. Derndorf, meinar, at kvinnurnar eftir fáum árhundraðum verða á hædd við menninar í likamligari megi. Hann heldur seg kunna prógva við tølum frá olympisku leikunum, har kvinnurnar undir somu treytum, nú kunnu gera roysni, ið bara liggja 15 pst. undir tí, menninir kunnu gera.

MANNSINS LUTUR í HJÚNARBANDINUM

Av hesum kanningum kundu teir vísu ikki halda seg fyri freistingunum at kanna eftir, hvussu hin móði hevði tað í hjúnarbandinum.

Úrslitið var hitt syrgiliga, at annar hvør maður í Europa var undir tufluni. Og í Ameriku, sum á mang an hátt verður tikið sum fyrimynd fyri framtíðina hjá okkara heimsparti, mugu 85 av hvørjum 100 monnum ásanna, at tað er konan, sum ber brøkurnar í teirra familju.

Ja, ja, nú er so maðurin endaliga niðurmøddur av at hava strevast fyri føðina til familjuna í ártúsindir

Lesið SOSIALIN!
Keypið SOSIALIN!
Haldið SOSIALIN!

BARNAMATUR

KROSSORÐ:



Yvir: 1) hús 6) noktan 7) likamslutur 9) skipamerking 10) stongsul 12) akfar 14) skeiv bókstavrøð 16) støv 17) matur 19) á bátinum.

Niður: 1) ljódligur 2) liv 3) lær 4) kunstur 5) tól 8) hugdi 11) væta 13) hol 15) vesælingur 18) skipastavir.

—o—

BÓKSTAVAGÁTA. Niðanfyri standa nakrir bókstavir. Tú skalt seta teir soleiðis saman, at tú fært orð av sama slag, annaðhvørt tú lesir yvir- ella niðureftir. Orðini skulu merkja:

1) gjald 2) mannsnavn 3) í Danmark 4) vokstur og 5) djórið.

A	A	A	A	Ð
E	E	I	I	I
I	I	I	L	N
N	N	N	R	R
R	S	S	T	T

Veitst tú

AT atomkandidaturin Karsten Hoydal, sum undan fólkatingsvalinum í 1960 segði seg einsamallan til reiðar at reka alt hervald av landinum, nú hann mannsterkur situr á tingi og í landsstýri sigar tað vera nærum ógjørligt at fáa tamarhald á silkisokka- og sukurprísunum.

AT hitt størsta kurteisið, teir gomlu indianarnir í Amerika kundu vísa einum fremmandum, var í djúpari tegn at lata viðkomandi fáa nakrar roykir úr pipu teirra.

AT hin størsti gullklumpurin, ið nakar veit um, varð funnin í Australiu fyri níti árum síðan, og at hann vegaði 100 kg.

AT síðan 1895 er sjógvurin fløddur umleið 10 cm; orsøkin sigst at vera ísbræðingarnar við pólarnar.

AT fyri hvørja ferð, tú tekur trý kílo uppá, má kroppurin framleiða 250.000 fleiri blóðlikam.

Ey Gjað

GRUNDLÓG FØROYA

Sum kunnugt hevur hetta landsstýrið sett sær fyri at gera seg inná heimastýrislógina, og einaferð var likt til, at tjóðveldismenn uttan himpr kundu fáa fólkaflokks- og sjálvstýrismenn at leita hesa leið; men higartil er henda mikla afturhaldssamanrenning ikki komin so langt, at teir hava torað at fara í beinleiðis hernað móti »grundlóg Føroya«, sum var yndisorð sjálvstýrismanna undan seinasta vali um hesa lóg. Vit pilka hetta brot burtur úr »Krossi« undan seinasta vali um hetta sama evnið:

»... **Og tað, sum tryggjar best í hesum føri, er, at júst hesir triggir landsstýrisflokkarir eru teir, ið skapað hava okkara stýrisskipan og góðkent hava og virkað eftir henni sum grundlóg okkara** ...«

hugskot

HVAT MERKIR TAÐ?

AT **boykotta** ein arbeiðsgevara ella ein stat er eitt álvarsmál. Er ein boykottaður, er ein eisini settur uttandura. Orðið kom fram í Irlandi umleið 1880, tá bøndurnir, sum gjørdist illir inná góðsuppsitaran C. C. Boycott. Arbeiðararnir rýmdu frá honum stutt áðrenn innheystingin skuldi byrja; hann kundi ongan annan fáa at hjálpa sær, sjálvt um tað var hópur av arbeiðsleysum monnum. Slaktarar og bakarar vildu ikki handla við hann, og jarnbreytirnar noktaðu at flyta hansara vørur. Sjálvt um stjórnin royndi at hjálpa honum, var tað til enga nyttu, og hann mátti rýma úr heimlandi sínum — og lata navn sítt sita eftir sum heitið fyri væleydnaðum stríði móti hørðum harrum.

ÚTVARPIÐ

DÝRAST AT LURTA OG HYGGJA

Danmark og Noreg liggja á odda, tá ið talan er um gjaldshæddina fyri radio og fjarsýn. Hvørt radiotólið kostar 35 kr. og hvørt fjarsýnið 140 kr. um mánaðin. Í Danmark er ætlanin at hækka hesi gjøld — einar 20—30 kr. um árið.

Til heystar rokna teir við, at tað vera 1.000.000 fjarsýn — TV — í Danmark. Prísirnir í nøkrum londum eru annars hesir:

	TV+radio	radio
Danmark	145,00 kr.	35,00 kr.
Noreg	140,00 "	40,00 "
Svøriki	130,00 "	40,00 "
Finland	130,00 "	45,00 "
Bretland	80,00 "	20,00 "
V-Týskland	120,00 "	—
Holland	72,00 "	36,00 "
Belgia	117,00 "	20,00 "
Føroyar	—	30,00 "

VERULEIKI

TAÐ ER VERULEIKI

AT **»sjálvstýrislandsstýrið« sýtti fyr oyskum arbeiðarum at fáa fulla 44 tíma viku beinanvegin, men at hetta mátti gerast í stigum, meðan tað ikki var talan um stigvisa lønarhækking, tá ið talan var at hækka lønir landsstýrismanna við 6000 kr. um árið + viðbøtur í túsindatals krónum.**

FØÐINGARDAGUR

Í dag 22. juli verður Elísabeth Weihe, Havn 80 ár.

Haldið Sosialin

SØKKIÐ BISMARCK!

eftir C. S. FORESTER

umsett hevur MICHEL NIELSEN

(Framhald)

XI. KÓS MÓTI FRANKARIKI

Í bestikkrúminum á King George V vóru nógvir uniformsjakkar við nógvum gulli á ermunum kømnar saman og stóðu nú kring eitt borð, hvar ein navigatiónsyvirmaður klárgjørdi stoðuna á einum korti. »Her er tann seinast kenda positiónin hjá Bismarck, og her er so langt, sum hann kann vera sloppin síðani. Tað er nú ein heldur stórur cirkul, hann kann vera, hvar tað skal vera her innanfyri, og cirkulin er skjótt eins stórur og Europa. MEN — teir hava leitað eftir honum við flogførum ...« navigatiónsyvirmaðurin fjaldi eitt øki við nógvum paralellum linjum, »... og her, og her.« Nú kom nakað heilt nýtt fram. Onnur helvtin av cirklinum var nú fjaldur av paralellum strikum. »Vit hava sjálvir leitað við jagarum her, so hetta økið hava vit eisini, og so kunnu tygum siggja, hvat er eftir. Um hann ikki er farin beint suðureftir, er bert ein møguleiki eftir. Hann hevur kós móti Franka riki.



BERT EITT KUNDI BISMARCK GJØRT — SETT KÓS MÓTI FRANKARIKI.

»Og so má hann vera har,« segði ein rødd og ein armur við admiralsmerki peikaði á kortið. »Ja, tiverri sir.« Hundrað fjórðingar framman fyri okkum, og hann gongur skjótari.« »Ja, tað er tiverri eisini satt, sir. Teir kundu ikki ansa eftir allastaðni. Tað vóru ikki nóg nógv flogfør, illveður og alt sovorðið.« »Eg hopi sanniliga, at teir fara at leita har nú. Hvar er Ark Royal? Hann skuldi verið nóg nær nú.« »Her er hann, sir, eftir hvatið admiralitetið sigur.«

—o—

Ark Royal hevði ræðuligt veður. Hann striddist tungliga framefitir og tá hann vendi gronina uppimóti, reyk afturendin 50 føtur upp og niður hvørja fer. Regn var afturat og ræðuliga kalt. Tó noyddust flogførini upp. Tað var við neyð og deyð, at tey komu so langt, og tey hvurvu alt fyri eitt í tí gráa myrkrinum. Frá Lough Erne í Írlandi fóru nøkur Catalina flogfør í ein útsynning, so at teir kundu vera, har teir skuldu leita, tá tað lýsti í. Tá teir komu har byrjaðu tey at flúgva paralelt í ein útsynning, vendu tá tey komu til markið fyri, hvar tey skuldu leita, flugu so 50 miles í ein landnyrðing og settu so kós í útnyrðing fyri at flúgva heim eftir at hava fjalt havið við einum finum neti, einum neti, sum kundi teknast uppá kortið í admiralitetinum, og nýggjar strikur komu hvørja ferð eitt flogfar segði frá, at tað var heimkomið. Tað økið, hvar ikki enn var leitað minkaði í stórum. Og eitt Catalina flogfar var júst liðugt og skuldi seta kós heimeftir, tá manningin sá okkurt niðriundir. »Hvat er hatta?« spurdi ein teirra. Tað var so tiúkt í mjørka, at teir flugu bert 500 føtur uppi, og tó sóu teir bert skipið sum ein óklára skugga. Teir vóru at kalla beint uppi yvir tí. »Flúgv nærri! Far runt um hekkuna!« segði annarpiloturin. »Tað er eitt slagskip, og tað hevur onga oyðaraverju. TAÐ ER BISMARCK!!« Ein tók ein pappírslepa og byrjaði at skriva eini boð. Í somu løtu ristist Catalina'in og fór sendandi á liðina, tí ein granat brast beint undir teimum. Hann helt fram at skriva, meðan piloturin við rúkandi ferð vendi flogfarið; havið og skipið undir teimum fór malandi fyri eygum teirra, granatirnar brustu allastaðni, og Catalina'in fór longur og longur uppeftir fyri at krógva seg í skýggjunum. Tá mjørkin legði seg runduan um teir byrjaði telegrafisturin at senda boð sini.

—o—

Admiral Lütjens sat og svav hond uppundir kinn í lenistóli sínum tá ávarðingarýlini hoyrdust kring alt skipið. Hann vaknaði, turkaði svøvnin úr eygunum og leyp so upp á brúnna. Allastaðni vóru sovandi menn vaktir av ólýðinum, skræddir út úr dreymalandi sum teir sótu upp móti skott um, hvar summir høvdu sovið ófriðaliga, meðan aðrir, teir sum vóru á varðhaldi, høvdu striðst fyri ikki at sovna, skitnir og skeggjutir, ja, kanska høvdu summ ir fingið sær ein litlan blund, til teir vórðu vaktir. »Flúgvari á bakbordes síðu! Flúgvari til bakbordes!« Loftkanónirnar vórðu skjótt settar móti málinum, og byrjaðu so at skjóta við dundrandi larmi, meðan granatirnar flugu av stað móti Catalina'ina. Lütjens og Lindemann møttust á brúnni. »So kommandørur, nú funnu teir okkum endiliga.« »Ja, harra admiralur. Hatta var ein Catalina. Eitt flogfar við stoð á landi.« »Ja.« Teir fóru inn í bestikkrúmið. »Hvussu nær skulu vit vera Frankariki fyri at fáa verju frá Luftwaffe?« spurdi Lütjens. Navigatørurin gjørdi ein cirkul á sjókortinum. »Hetta er so nøkulunda markið, harra admiralur.« Hann mátaði við passaranum millum positiónina hjá Bismarck og cirkulin. »Og hartil koma vit í morgin í lýsingini, harra admiralur.« Lütjens og Lindemann hugdu at hvørjum øðrum. »Í lýsingini í morgin.« segði Lindemann og hugdi at urinum. »So hava vit tiegiu tímars dagljós fyri okkum.« »Og so hava vit loftverju,« segði Lütjens,« og tá er onnin, sum torir móti okkum.« Radioyvirmaðurin kom inn og heilsaði. »Vit hava fingið fatur á boðunum frá tí bretska flogfarinum, harra admiralur,« segði hann. »Kunnu tey týðast?« »Nei, harra admiralur, ikki í hasi kodini, men tað er skilligt, at tað er okkara position, kós og ferð.« »Ja, eg roknaði heldur ikki við, at tað vóru jólaheilsur,« segði Lütjens. »Og vit hava fingið fatur á tveimum stuttum boðum, harra admiralur.« »So.« »Ja, tey kundi eg heldur ikki lesa, men eg veit at tey eru send frá einum »Swordfishe-flogfari.« »Swordfish?« spurdi Lindemann. »So er, harra kommandørur.« »Takk, løytnantur,« segði Lütjens. Radioyvirmaðurin fór av stað og hinir báðir boygdu seg yvir kortið. »Um nú ein flogberi er her, má tað vera megi H, sum er komin fram frá Gibraltar,« segði Lütjens. »Teir kunnu meira enn so vera komnir hertil. Hvar er teirra møguliga position? Tygum vita jú, nær teir fóru út.« Navigatørurin gjørdi ein nýggjan cirkul við centrum í Gibraltar. Hann kom næstan heilt fram til Bismarck. »Teir kunnu koma framá okkum, nær tað skal vera, harra admiralur.« Stabschefurin fór at hyggja í eina bók við skipsbíletum. »Megi H.« segði hann og peik aði á eitt. »Renown.« »Fimm minuttirs arbeiði hjá kanónum okkara.« »Sheffield.« »Hann tolir ikki so frægt sum eitt skot.« »Ark Royal« »Tað eru hansara »Swordfishe, vit hoyra nú. Vit hava fyrr sligið eitt slikt álop aftur, og nýtast tí ikki at óttast fleiri.« Meðan hetta, var navigatørurin sovnaður. Hann vaknaði knappliga, tá albogin datt niður á borðið. »Minnst til, at ongin her um borð hevur sovið tey seinastu seks samdøgrini, harra admiralur.« segði Lindemann. »Nú er bert ein nátt eftir, Lindemann, bert ein einasta nátt.« Teir fóru aftur út á brúnna og stardu út yvir tað óslætta havið. »Ringur siógvur, lág skýggj, sýnið so ringt, sum tað kann vera. Tað eru ikki tey bestu líkindini fyri einum flogbera,« segði Lütjens.

(Framhald.)